

## Tríggir nýggir tilburðir av H1N1 í Íslandi

Tríggir nýggir tilburðir av Influensu A (H1N1) eru staðfestir í Íslandi. Tað boða myndugleikarnir frá í dag. Sostatt eru sjey tilburðir staðfestir har. Talan er um fólk í 18 – 19 ára aldrinum, kall og konu, sum komu heim úr Avstralia og kvinnu, ið kom heim úr Sambandsríkinum Amerika, skriva íslendskir myndugleikar á farsóttaheimasíðuni www.infulensa.is. Øll viknaðu eftir heimkomuna, men ikki álvarsliga. Royndir vóru tiknar, og niðurstøða fekst í gjár. Harvið er talið av tilburðum í Íslandi komið upp á sjey.

# Fimm fingið staðfest H1N1

**Nú er talið á føroyingum, ið eru smittaðir við H1N1, komið upp á fimm. Fýra av kannaðu børnunum á Dagstovninum í Maritugøtu fingu staðfest sjúkuna í gjár**

H1N1
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*



- Fýra smábørn á Dagstovninum í Maritugøtu eru smittað við svínakrími. Harvið er talið uppi á fimm tilburðum í Føroyum. Tað staðfesti Bjarni á Steig, virkandi landslækni, í gjár.

Talan er um sonin hjá fyrsta smittaða manninum, sum fekk staðfest svínakrímið leygardagin, og trý onnur børn á sama stovni.

Húskini, sum talan er um, eru sett í viðgerð, og hartil er í løtuni illgruni um ein annan tilburð av svínakrími.

Talan er um eina 26 ára gamla kvinnu, sum sat undir liðini á smittaða manninum í flogfarinum á veg til Føroya seinasta týsdag klokkan 14. Svarið av tí kanningini kemur væntandi í dag.

### Enn á stig 5

Tilbúgvingin í Føroyum er enn á fimta stigi. Orsøkin til hetta er, at mett verður at tamarhald er á støðuni.

- Vit vita hvør hevur smittað hvønn, og tí eru vit ikki farin úr stig 5 enn, vísir Bjarni á Steig á.

18 fólk vóru kannað, og harav vóru fýra smittað.

### Góð ráð

Landslæknin og Heilsumálaráðið boða frá, at sambært vitan um smittuna frá øðrum londum, so fer Influensa A H1N1 í flestu førum at vísa seg sum eina milda krímsjúku, sum hæsar av eftir heilt fáum døgum. Tó er týdningarmikið, at fólk ikki eru líkasæl, men fylgja hesum leiðreglum, um tey hava krímsjúkueyðkenni.

Sjúkueyðkennini eru: Knappliga íkomin sjúka við yvir 38 hitastig Celsius, sjúkueyðkenni frá andaleið - vanliga ilt í hálsi og hosti- og pína í vøddum. Leyst lív koma fyri.

Er ein vorðin sjúkur við hesum sjúkueyðkennum, skal ein vegna smittuvandan í mest møguligan mun verða verandi heima. Ring til egnan kommunulækna ella læknavaktina, um klokkan er farin av 16. Far ikki til lækna uttan at hava avtalað tað frammanundan.

Til endalig greiða er fingin á, um ein er vorðin smittaður, skal ein hava samband við so fá fólk sum til ber.

Føroysku heilsumyndugleikarnir fylgja gongdini neyvt og komandi dagarnar fæst meira at vita um hetta, boða Heilsumálaráðið og Landslæknin frá.

# Heilsustarvsfólk framíhjárætt til koppseting

**Koppsetingin móti H1N1 væntast fyrst klár um tríggjar mánaðir, men tá hon kemur, standa heilsustarvsfólk í fremstu røð at fáa koppsetingina**

H1N1
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Deildin fyri koppsetingargranskingundir heimsheilsustovninum WHO staðfesti fyrradagin, at H1N1-heimsfarsóttin ikki er til at steðga, og viðmælti samstundis at starvsfólk í heilsuverkinum verða raðfest ovast, tá koppsetingarnar skulu gerast.

Serfrøðingarnir í bólkinum hava lagt dent á trý mál, ið lond eiga at taka við sum partur av teirra koppsetingarpolitikki.

Tað fyrsta er at varðveita eitt heilskapað heilsuverk og mest umráðandi partarnar av undirstøðikervinum.

Tað næsta er at minka um sjúkuna og deyðsføllini, og tað triðja at minka sum mest um smittuna innan í samfelagnum.

### Fyrst heilsuverk, so børn og vaksin

Eisini í føroysku tilbúgvingarætlanini stendur tilskilað, hvørjir bólkar eiga at verða raðfestir, um avmarkað nøgd av koppingarevni verður tøk.

Raðfestingin er vanliga soleiðis, tó nú er mælt til at uppraðfesta heilsustarvsfólk:

Fólk í kendum vandabólkum. Bólkarnir verða nærri lýstir, tá ið vit kenna sereyðkenni fyri heimsfarsóttina
Heilsustarvsfólk
Stuðulsstarvsfólk og aðrir myndugleikar
Fólk á sosialum stovnum
Fólk í flutningstænastu, postverki og telekommunikatión
Fólk í serligum, týdningarmiklum starvi innan privat virksemi

Í Føroyum er talan her um eini 16.000 fólk tilsamans, ið er ein triðingur av fólkinum í landinum. Eftir hetta kemur eitt samlað punkt, ið eitur »Alt fólkið«.

Enn er einki koppingarevni tøkt, og væntað verður at koppingarevni verður fyrst tøkt um tveir til tríggjar mánaðir. Tó hava Føroyar tryggjað sær eina koppsetingargaranti, eins og hini Norðurlondini, tá hesi einaferð verða tøk.

# Fátøk onga koppseting

**Fátækt ferð at forða summum londum í at fáa koppseting móti H1N1 kríminum.**
**- Nógv tann størsti parturin av koppsetingini fer til rík lond, staðfestir aðalskrivarin í WHO, Dr. Margaret Chan**

H1N1
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Gjógvin millum rík og fátøk er ikki sett úr gildi, hóast talan er um eina heimsfarsótt. Meir enn nakrantíð ger peningurin seg galdandi, og verða tað tey fátøku, ið verða við sviðusoð, tá koppingarevni móti H1N1 skulu býtast út.

Tað kunnu bert framleiðast eitt ávíst tal av koppsetingum, ið ikki er nokk til tær 6,8 milliardirnar av fólkum í heiminum, sigur Margret Chan.

- Meginparturin av sendingini fer til vælhavandi lond. Enn einaferð kemur fyrimunurin við at verða vælhavandi og vansin við fátækt til sjóndar, ljóðar kritikkurin frá aðalskrivaranum í WHO.

Granskingarleiðarin hjá WHO meinar, at H1N1 ikki er til at steðga, men at ein koppseting verður tøk í september.

Ein avtala er gjørd við tvær stórar heilivágsfyritøkur, sum merkir at WHO kann senda 250 milliónir koppsetingar til menningarlondini – eitt tal í týðiliga ikki er nóg mikið, sambært aðalskrivaranum í WHO.

